# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg haldi fram, tí eg haldi, at eg eri best egnað til at leiða flokkin og best egnað til at leiða landið*

*(Hillary Clinton)*



*Hesin maðurin, sum búði í býnum Beichuan, fekk skaða í jarðskjálvtanum og situr og bíðar eftir hjálp. Húsini eru rapað (Mynd: Polfoto)*

## Heilir býir eru javnaðir við jørðina

**Teir fyrstu bjargingarmenninir, sum komu til økið, har jarðskjálvtin hevði miðdepil, fingu eina ræðandi sjón at síggja**

- Hetta er ræðuligt. Í summum býum er ikki eitt einasta hús eftir. Øll eru rapað, og býirnir eru stutt sagt javnaðir við jørðina, sigur talsmaðurin hjá teirri serligu løgregludeildini, sum stendur fyri bjargingararbeiðinum eftir tann ógvusliga jarðskjálvan fyrradagin.

Myndugleikarnir í Beijing kunngjørdu í morgun, at teir høvdu biðið herin senda 30.000 hermenn afturat til vanlukkuøkið. Frammanundan vóru 20.000 hermenn við í bjargingararbeiðinum, og hildið verður, at nú eru bjargingarfólkini umleið 100.000 í tali.

Men bjargingararbeiðið er nógv darvað av oyðiløgdum vegum og brúm, og nógvastaðni er eingin streymur. Myndugleikarnir høvdu ætlanir um at lata flogfør tveita neyðhjálp niður, men tað mátti avlýsast, tí veðrið er so vánaligt.

Almennu fjølmiðlarnir siga, at í umleið 7.700 av teimum 10.000, sum búðu í býnum Yingxiu, eru deyð, og miðlarnir siga, at fleiri býir eru stutt sagt fullkomiliga lagdir í oyði. Alment verður sagt, at umleið 14.000 fólk eru deyð, men tað talið verður nógv størri, tí nógv túsund eru ikki komin afturíaftur. Í morgun ljóðaði, at bara í býnum Mianyang eru 19.000 fólk jarðað undir húsaleivdunum.

## Nógv børn deyð í Burma

**Talsmenn hjá ST bera ótta fyri, at serliga nógv børn eru deyð av melduródnini, sum herjaði Burma fyri skjótt 14 døgum síðani. Alment verður sagt, at 62 .000 fólk eru deyð, men ST heldur, at tað veruliga talið mann vera um 100.000, og av umleið 40 prosent av teimum vóru børn.**

**Samstundis hevur UNICEF gjørt vart við, at børn, sum hava mist foreldrini, og sum eru í neyðhjálparlegum, eru ofta í stórum vanda fyri at blíva misnýtt kynsliga.**

**- Okkara upplýsingar benda á, at tað eru rættiliga nógv vaksin og fá børn í neyðhjálparlegunum, sigur ein talsmaður hjá hjálparfelagsskapinum Care við Reuters.**



*Madeleine McCann hvarv fyri einum ári síðani (Mynd: Polfoto)*

## Sá Madeleine í flogfari í Brasil

**Eitt vitni sigur seg hava sæð Madeleine McCann í teimum brasilskum flogfari**

Vitnið hevur sambært bretska blaðnum Daily Mail greitt frá, at Madeleine McCann var í einum flogfari, sum fór til Sao Paulo í Brasil, og Interpol váttar fyri blaðnum, at málið verður kannað.

- Tað er hálvur annar mánaður, síðani vitnið helt seg síggja Madeleine. Vit kanna málið enn, men eg kann ikki siga nakað um tað, sigur Jorge Pontes, sum er ovasti í Interpol, við Daily Mail.

Sambært Interpol-ovastanum heldur vitnið uppá, at tað var Madeleine McCann, sum var í flogfarinum til Sao Paulo.

STUTT SAGT

### 20. maður slapp

Amerikanska verjumálaráðið Pentagon hevur slept málinum ímóti Mohammed al-Qahtami, sum hevur verið umrøddur sum 20. maður í sambandi við atsóknina tann 11. septembur í 2001. Fyri trimum mánaðum síðani vórðu hann og fimm aðrir ákærdir fyri morð og yvirgang, men nú hevur Pentagon gjørt av at sleppa ákæruni ímóti al-Qathami. Sambært amerikanska ákæruvaldinum skuldi Mohammed al-Qahatami taka lut í flogránunum og atsóknunum tann 11. septembur í 2001, men tað eydnaðist honum ikki at fáa innferðarloyvi til USA. Seinni bleiv Mohammed al-Qahtami tikin fyri at hava havt samband við al-Qaeda, men sambært verja hansara játtaði hann tað undir trýsti.



*Pentagon aftan á atsóknina 11. septembur í 2001 (Mynd: Polfoto)*

### Drápsmaður royndi at flýggja

Nikita Joakim Fouganthine, sum er dømdur lívlanga fongsulsrevsing í Finnlandi fyri tvey dráp, royndi ní um dagarnar at flýggja. Fouganthine, sum hevur sitið 22 ár í fongsli, skuldi eftir ætlanini royndarleyslatast í juli, og teir seinastu mánaðirnar er hann sloppin at fyrirerika seg til broytingina. Um hvítusunnuna slapp hann at búgva í einari íbúð, men hann valdi at rýma. Tað eydnaðist kortini løgregluni at finna hann í einari bygd í Norðurfinnlandi.